# Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# TRÚFASTI RIDDARIN Á OYRARBAKKA

Tað er ikki við mýkindum, sum dannebrogriddarin norðan av Oyrarbakka fer við Sosialinum um vikuskiftið. Edmund Joensen hevur tikið sær tykni av, at vit í oddagrein hava sett spurnartekin við allan glantrileikin kring kongshúsið – og tað at føroyavitjanin hjá hennara hátign kanska kostar føroyskum og donskum skattgjaldarum áleið tað, sum Edmund Joensen og hansara felagar í samgonguni ætla at taka frá føroyskum pensjónistum næsta ár – tá ætlanin er at taka av javningina av pensjónunum.

Taktiskur, sum Edmund Joensen er, hevur hann sum ein tann fyrsti fingið sær sín egna spinndoktara – ein útbúnan journalist at skriva fyri seg. Men hesaferð taka teir í so rívan til. Ikki færri enn níggju ferðir kallar hann Sosialin fyri floksblaðið hjá Javnaðarflokkinum. At hann ger sjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum og Tjóðveldinum til sjónarmið hjá »floksblaðnum« – og øvugt – má standa fyri hansara rokning. Vit kundu sagt, at Edmund røður á rækjuvirkjunum á Oyri. Men tað ger hann ikki, tí tað er selt. Vit kundu sagt, at hann røður í Sambandsflokkinum, men tað ger hann ikki, tí har varð hann koyrdu frá sum formaður. Sum ein royndur vinnulívsmaður, so veit Edmund væl, hvat tað merkir, at Javnaðarflokkurin hevur selt Sosialin – sum harvið eisini formliga varð loystur úr haftinum sum floksblað.

Men aftur til drotningina. Hon er ein klók kona. Tað vita vit, og tað hevur hon víst so mangan. Fitt og savnandi er hon eisini, og danir og føroyingar fegnast fegin um kongshúsið. Men fyri tað, so eru tað nógv fólk – bæði í Føroyum og í Danmark, sum halda, at alt hetta stásið kring konghúsið er yvirdrivið marglæti, sum skattgjaldarin skal gjalda.

Vit hava ein monark, sum er til pynt, og sum pyntar summar borgarar við riddarakrossum - helst fyri at keypa sær trúskap og styrkja støðuna hjá monarkinum – í øllum førum millum riddarastættina. Kanska okkurt er um tað, sum nevndarformaðurin í hinum »floksblaðnum«, Líggjas í Bø, skrivar um konspiratiónsteoriir, sum danska stjórnin skuldi gera sær dælt av eftir kríggið, at um føroyingar fingu kongsvitjan fimtahvørt ár – og um teir røttu menninir verða prýddir við riddarakrossinum, so liggja føroyingar skerflatir.

Hóast eitt uppskot um loysing frá Danmark hevði fallið við einum braki, tí føroyingar ynskja ikki loysing, so hevði ein fólkaatkvøða um framhaldi monarki kanska givið annað úrslit. Kongstrúskapur hevur einki við loysing ella samband at gera. Men »óføroyskt« er tað í øllum førum at gera so stóran mun á fólki.

## Drotningin keypir trúskap við riddarakrossum

# Guðrið á stóra pall



Guðrið Hansdóttir skal í august hava framførslu á stóra palli á Summar Festivalinum. Songkvinnan hevur áður spælt á Føroya største festivali, og fyrst í august er hon til reiðar við einari framførslu við sínum fangandi poppsangum.

– Guðrið Hansdóttir hevur fleiri havt framførslur á Summar Festivalinum, og í fjør hevði hon eina framúr góða konsert. Hon hevur eisini verið uttanlands og spælt, og tí halda vit, at tíðin er komin til, at Guðrið Hansdóttir spælir á stóra palli á Vágsbø, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum av Summar Festivalinum.

# The Dreams á MTV hitlista

Føroyski rockbólkurin The Dreams roynir í hesum døgum at vinna fram í Týsklandi, og byrjanin hevur verið góð. The Dreams vóru um mánaðarskiftið tiknir við á Rockzone listan hjá MTV í Týsklandi, og sangurin Revolt er komin beinleiðis inn sum nummar 2 á hesum lista.

Á Rockzone listanum kunnu hyggjarar hjá The Dreams í Týsklandi atkvøða fyri sangunum, og The Dreams er longu blivnir eitt populert val hjá mongum.

The Dreams skulu eisini hava fleiri konsertir í Týsklandi í næstum. Miðskeiðis í juli spæla teir í Berlin, Munchen og í Hamburg, áðrenn teir síðani hava konsertir í Danmark og eina eistaka konsert í Føroyum.





## Rúsevni ein tikkandi bumba

ANNIKA OLSEN
KJAK Á SÍÐU 13



## Kenni meg noyddan at tala at

HELGI FOSSÁDAL
KJAK Á SÍÐU 12



# Einki er sum Svangaskarð

Amerikanski fjølmiðilin ESPN, sum er leiðandi innan ítrótt í sambandsríkinum, hevur gjørt ein lista við teimum bestu øðrvísi upplivingunum innan ítrótt kring heimin. Tað hevur Lane Strauss gjørt fyri ESPN The Magazine, sum kemur út 12. Juli.

Tey hava valt heldur øðrvísi vinklar upp á ítróttin, og ein av teimum er »Bestu, bíligu plássini« til ítróttarkapping, og har heldur Lane Strauss, at Svangaskarði er í serflokki.

– Skalt tú av álvara hava eitt flott útsýni, skal tú fara til Svangaskarð, skrivar ESPN og endurgevur eitt umboð fyri Vivid Seats fyri at siga, at tað eru nógv áhugverd støð at vitja, men einki er sum Svangaskarð.

ESPN hevur eisini funnið eina mynd, sum er tikin omanfyri Svangaskarð á einum góðum degi, tá ið sólin skein, og grasið var grønt. Og tað sær rættiliga innbjóðandi út. Hvør veit, um amerikumenn fara at leita sær til Føroya at hyggja eftir onkrum av komandi EM-dystunum hjá Føroyum.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo